# Kunningarskriv

Sum kunnugt hevur Føroya Handverkarafelag eina samlagstrygging í Tryggingarfelagnum LÍV. Felagið hevur eitt tætt samstarv við LÍV, og vit eru javnan og tosa við LÍV um okkara viðurskifti og vilja alla tíðina gera okkara samlagstrygging betur.

Hetta hevur haft við sær, at vit nú hava víðkað okkara samlagstrygging.

## Víðkað samlagstrygging hjá FHF

Samlagstryggingin hjá FHF umfatar í dag:

| | |
|---|---|
| Lívstrygging | kr. 500.000 |
| Hjúnafelagsveiting | kr. 250.000 |
| Trygging við ávísar hættisligar sjúkur limur | kr. 100.000 |
| Trygging við ávísar hættisligar sjúkur børn undir 18 ár hjá limi | kr. 100.000 |
| Lokaupphædd | kr. 100.000 |

Tryggingin er nú víðkað til eisini at fevna um:

| | |
|---|---|
| Lívstrygging til børn undir 18 ár hjá tryggjaða | kr. 20.000 hvørt barn |

Hendan lívstryggingin virkar uppá tann mátan, at um **limurin** hjá Føroya Handverkarafelag doyr áðrenn fylta 67 ár, fær hvørt barn, sum er undir 18 ár, kr. 20.000 skattafrítt.

Prísurin fyri samlagstryggingina verður tikin av eftirlønarinngjaldinum.

## Samlagstrygging til lærlingar

Samlagstryggingin hevur bert umfatað sveinar orsakað av, at eftirlønarinngjaldið hjá lærlingum er so lágt. Men Føroya Handverkarafelag hevur nú gjørt eina avtalu, sum ger, at eisini lærlingar hava eina samlagstrygging.

Hendan avtalan umfatar:

| | |
|---|---|
| Lívstrygging | kr. 500.000 |
| Trygging við ávísar hættisligar sjúkur limur | kr. 100.000 |
| Trygging við ávísar hættisligar sjúkur børn undir 18 ár hjá limi | kr. 100.000 |

Prísurin fyri samlagstryggingina verður tikin av eftirlønarinngjaldinum.

Omanfyri nevndu broytingar koma í gildið 01.01.2016

**Felagið vil takka fyri brátt farna ár og ynskja øllum limunum og familju teirra eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.**